# Bjarnastein gongur egnar leiðir

**Í dag heldur Petur Magnus Bjarnastein 10 ára dagin sum gittarbyggjari. Nógv er broytt síðani fyrsta gittarin, og nú brúkar hann sítt heilt egna design, síni egnu amboð og serliga arbeiðshátt**

GITTARBYGGJARI
*Eyðun Klakstein*

Einasti veruligi føroysku gittarbyggjarin hevur nú 10 ár á baki.

Og tað fer Petur Magnus Bjarnastein at halda við serligum tiltaki í SMS í Havn. Har fer hann at vísa fram nýggjasta sniðið av Bjarnastein Guitars, og tvær konsertir verða eisini í sambandi við runda dagin. Petur Magnus er nú í holt við gittara nummar 32, og tað er nógv broytt, síðani hann gjørdi tann fyrsta fyri 10 árum síðani.

– Eg haldi, at tann fyrsti eydnaðist væl til at vera tann fyrsti, men alt er broytt síðani tá. Eg brúkti tað tilfar, sum eg fekk fatur á í Føroyum, og eg brúkti vanlig amboð til at snikka gittar til. Nú fái eg serligt tilfar úr Onglandi, og eg havi heilt serliga amboð at gera gittara við, sigur Petur Magnus.

Fleiri føroyskir gittarspælarar brúka hansara gittar, og teir kendastu eru kanska Jens Marni Hansen, Rói Christiansen og Jón Tyril, sum allir hava spælt og spæla við kendum føroyskum bólkum.



*Petur Magnus Bjarnastein er nú í holt við gittara nummar 32, og tað er nógv broytt, síðani hann gjørdi tann fyrsta fyri 10 árum síðani*

## Ment sín egna stíl

Tá ið fyrsta Bjarnastein gittarin var bygdur, hevði Petur Magnus ikki nakra handverksliga útbúgving, men tað fekk hann sær seinni. Hann lærdi til bygningssnikkara, og tann útbúgvingin er komin væl við í arbeiðnum við ljóðførum. Petur Magnus ger sjálvur sítt design, hann teknar gittarnar, og hann byggir teir frá grundini av.

Hann hevur eisini gjørt sær síni serligu amboð, sum gera tað lættari og betir at byggja gittarar, og so hevur hann funnið sær sín heilt egna arbeiðshátt.

– Eg brúki sama arbeiðshátt, sum tá ið mann fresar hurðahongsl og trapputrin, og tað havi eg ikki sæð nakran annan gittarbyggjara brúkt. Eg havi lisið nógvar bøkur um gittarbygging, men eingin brúkar sama arbeiðshátt, sum eg brúki, sigur hann.

– Hesin arbeiðsháttur ger tað møguligt at gera góðar gittarar við góðum handverki, samstundis sum tað ber til at vera effektivur.

## Nýggj seria

Seinasta árið hevur Petur Magnus arbeitt við einum heilt nýggjum Bjarnastein-modelli, sum hann ætlar at framleiða nógvar av næstu tíðina.

– Eg byrjaði í desember í fjør at tekna, og síðani havi eg bara arbeitt við hesum modelli. Hetta skal vera ein seria, sum eg komi at framleiða næstu tíðina, sigur hann.

Hendan Bjarnastein gittarin verður sýnd fram á Torginum í SMS fríggjadagin og leygardagin, og í sambandi við runda dagin verða 10 av hesum gittarum sýndar fram. Teir verða seldir í Elding fyri 10.000 kr.

– Grundmodellið av hesum gittar kemur at kosta 12.500 krónur, og so ber eisini til at fáa serligt tilfar, sum kemur at gera hann nakað dýrari. Tað verður tó eingin broyting gjørd við sjálvum sniðunum av hesi gittar. Hetta ger, at eg kann gera teir nakað bíligari, enn eg havi gjørt gittarar fyri áður, sigur Petur Magnus.

Nýggja modellið hevur eitt ljóð, sum minnir um Fender Stratocaster, men sniðið er heilt egið.

## Konsertir í SMS

Bæði fríggjadagin og leygardagin verða konsertir við Bjarnastein-gittarum á Torginum í SMS. Fríggjadagin kl. 16.30 og leygardagin kl. 11.20.

Fimm føroyskir gittarspælarar fara at spæla á gittarar hjá Petur Magnus, og saman við teimum fer ein bólkur at spæla. Í bólkinum eru Henning Nicodemussen (trummur), Arnold Ludvig (bass) og Gunnar Guttesen (ljómborð).

Gittarspælararnir eru Jens Marni Hansen, Hjalti Joensen, Mikkjal Hvannastein, Heðin Ziska Davidsen og Uni Debess.

Og tá ið Petur Magnus Bjarnastein hevur lagt føðingardagin aftur um seg og skal líta fram í tíðina, so vónar hann, at næsta málið, hann fer at røkka, verður útflutningur av sínum gittara. Hann hugsar í fyrstu syftu serliga um Danmark og England.

Kent enskt gittarblað hevur longu víst Bjarnastein áhuga og ætlar í næstum at royna gittaran.



*Jón Tyril, gittarspælari í Clickhaze, brúka Bjarnastein*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Makrel og 200 hava konsertir

**Fríggjakvøldið og leygarkvøldið fara rockbólkarnir Makrel og 200 at hava konsertir í Klaksvík og í Havn. Teir fara at spæla sangir, sum teir sjálvir hava gjørt og givið út**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Fyrra konsertin verður í Atlantis í Klaksvík fríggjakvøldið 14. november á midnátt. Seinna konsertin verður á Gamla Meiarínum í Havn leygarkvøldið 15. november kl. 22.00.

Bæði Makrel og 200 spæla tónleik, sum teir sjálvir hava gjørt, og báðir bólkarnir hava givið fløgu út. Makrel arbeiðir nú við nýggjari fløgu, sum teir ætla skal koma út fyrst í komandi ári.

Á konsertunum fara bólkarnir at spæla sín egna rocktónleik.



*Ári Rouch og hinir í Makrel spæla í Klaksvík og í Havn um vikuskiftið*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Týr hevur úr at gera

**Næstu vikurnar fer rockbólkurin Týr at spæla í Føroyum, Íslandi og í Russlandi, og nú er endaliga skráin fyri konsertferðina løgd**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Týr leggur fyri í Íslandi í døgunum frá 21. til 23. november. Bólkurin spælir á Grand Rokk í Reykjavík 21., í Hvíta Húsið á Selfossi 22. og í Tjarnarbíó í Reykjavík 23. november. Saman við Týr verður eisini svenski bólkurin Freak Kitchen á konsertferðini í Íslandi.

Í døgunum frá 27. til 29. november fer Týr at spæla í Havn, Klaksvík og í Vági.

Og fyrst í desember fer bólkurin so til Russlands, har teir skulu spæla í St. Peterseburg og í Petrozavodsk í døgunum frá 3. til 7. desember.

# I AM við fløgu síðst í november

**Nýggja fløgan hjá gospelbólkinum I AM hevur fingið heitið xthree.one.four. 10 sangir eru á útgávuni, sum væntandi kemur í sølubúðirnar 28. november**

Fremsti føroyski gospelbólkurin, I AM, er á veg við nýggjari útgávu. Teir hava áður givið fløguna CAST út, og nú koma teir við einum uppfylgjara.

Upptøkurnar til fløguna vóru gjørdar í Pegasus í Klaksvík í summar, og síðani er nakað tikið upp í Keypmannahavn, har produsarin av fløguni, Hans Poulsen, er búsitandi. Tónleikurin til fløguna verður ljóðblandaður um nakrar dagar, og so verður fløgan send til framleiðslu. Ætlanin er, at fløgan kemur út 28. november, og í sambandi við fløguna ætlar I AM at hava nakrar konsertir kring landið.





*Allan november mánaða hevur Øssur Mohr úr Fuglafirði listaframsýning í Leikalund í Klaksvík*
*Mynd: Bárður Lydersen*

# Øssur Mohr sýnir fram í Klaksvík

**Seinasta fríggjadag læt fuglfirðingurin, Øssur Mohr, upp listaframsýning í Leikalund í Klaksvík. Framsýningin er opin allan november mánaða**

LISTAFRAMSÝNING
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Øssur Mohr er 42 ára gamal og hevur í nøkur ár fingist við málningalist burturav.

Hann hevur fleiri ferðir sýnt fram, bæði her heima og uttanlands. Eitt nú hevur hann verið við á várframsýningini í listaskálanum, og uttanlands hava verk hansara fingið góð ummæli.

Allan november mánaða verða 15 av oljumálningum hansara at síggja í Leikalund í Klaksvík.

Alt árið, ein mánaða í senn, sýna ymisk listafólk verk síni fram í Leikalund í Klaksvík.

Leikalund er gávu- og bókabúð, sum heldur til í gomlu handilshúsinum hjá Jens Clæmunti Isaksen í Klaksvíksgarðinum.

Framsýningin í Leikalund í desember verður við myndum frá Trónda Paturssyni.


